## Við ferð inn í ES?

Íslendski uttanríkisráðharrin, Össur Skarphéðinsson, hevur góðar vónir um, at ES-nevndin fer at taka støðu til íslendsku umsóknina um limaskap longu í desember ella í seinasta lagi í mars næsta ár. Tað segði hann við svensku tíðindastovuna TT í gjár. Össur Skarpheðinsson vísti á, at íslendska stjórnin hevur svarað øllum spurningunum frá ES-nevndini, hóast freistin at svara ikki rennur út fyrr enn hálvan november. Tað er sambært finska uttanríkisráðharranum, Alexander Stubb, nýtt met, og fær Ísland svar longu í desember, er tað eisini nýtt met, segði hann við TT.



## Margretha í tvístøðu

Margretha drotning hevur sagt, at hon verður sitandi á trúnuni, til hon dettur av henni, men sambært vikublaðnum Billed Bladet er dotningin komin í eina tvístøðu. Blaðið, sum sigur seg vera „Danmarks royale ugeblad", skrivar, at drotningin noyðist at velja ímillum trúnuna og Heindrik prins. Ikki tí at prinsurin hóttir við at rýma, men tí at hann vil heldur vera á vínslotti sínum í Fraklandi enn í Danmark. Tí hevur drotningin tvinnar kostir í at velja: Um hon skal fylgja hjartanum og fara við manninum, ella um hon skal verða verandi heima og tæna danska fólkinum, skrivar Billed Bladet.

# Gingið sum vónað og væntað

**Freistin at tekna seg fyri pørtum av teimum 1.500.973 partabrøvunum, sum Atlantic Petroleum hevði sett í útboði, var úti í fyrradagin**

PARTABRØV
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*



*Wilhelm Petersen, stjóri í Atlantic Petroleum, roknar við, at málið at fáa 188 milliónir í kapitalhækkan verður nátt*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

8. oktober bjóðaði Atlantic Petroleum út 1.500.973 nýggj partabrøv í felagnum til kurs 125. Vórðu øll partabrøvini seld fór hetta at merkja eina kapitalhækkan á 188 milliónir krónur.

Peningurin skal fyrst og fremst brúkast til at afturgjalda stuttfreistað lán.

Vit kundu saktans nýtt pening, sum vit tjena við framleiðslunum úr teimum báðum brunnunum á Ettrick- og Chesnutleiðunum, men við hesari kapitalhækkanini hava vit rúmd at arbeiða víðari á øðrum økjum, sum er neyðugt, skulu vit framhaldandi menna felagið, segði Wilhelm Petersen við Sosialin, tá partabrøvini vórðu bjóðað út.

Nú er freistin at tekna partabrøv so av, og Wilhelm Petersen, stjóri í Atlantic Petroleum, er væl nøgdur við úrslitið.

- Nú er tað soleiðis, at tað er ikki gjørt endaliga upp enn, tað verður tað ein av fyrstu døgunum, men vit vita longu nú, at tað hevur gingið so, sum vit høvdu vónað og væntað, sigur Wilhelm Petersen.

### Vakstrarpotentiali

Partabrøvini vóru í fyrstu syftu boðin út millum verandi partaeigarar, og teimum stóð í boði at keypa partabrøv í lutfallinum 4:3. Tað merkir, at verandi eigarar kundu keypa fýra nýggj partabrøv fyri hvørju trý tey áttu framman undan.

- Tað er soleiðis, at verandi partaeigarar kunnu keypa nýggj partabrøv, ella teir kunnu selja rættin til hesi partabrøv. Og vit síggja, at tað hevur verið rímiliga stórur aktivitetur í tekningarrættinum, so eg vænti, at tað eru fleiri nýggir partaeigarar komnir til. Vit síggja eisini, at fleiri av stóru útlendsku íleggjarunum hava økt um sín lut í felagnum, sigur Wilhelm Petersen.

Tá tekningin av nýggjum partabrøvum byrjaði 8. oktober segði stjórin, at tað var eitt ynski, at fáa fleiri stóran útlendskar íleggjarar at keypa partabrøv í Atlantic Petroleum.

- Hetta hevur verið ein tilgongd, sum vit leingi hava arbeitt við. Felagið hevur eitt rímiliga stórt vakstrarpotentiali, og skulu vit gagnnýta hetta potentiali er neyðugt, at hava størri íleggjarar við sum viðspælarar, ið kenna felagið, sigur Wilhelm Petersen.

Málið hjá Atlantic Petroleum var at skapa eina kapitalhækkan á 188 milliónir krónur.

- Við tí fyrivarni, at ikki er endaligt uppgjørt enn, so hava vit kortini fylgt loypandi við, og vit hava eina sterka kenslu av, at vit fara at náa málinum, sigur Wilhelm Petersen, stjóri í Atlantic Petroleum.

### Tveir brunnar í sikti

Stjórin í Atlantic Petroleum sigur, at tað í longri tíð hevur verið arbeitt við at tillaga strukturin soleiðis, at hann passar til felagið.

- Longur fyri fleiri árum síðani løgdu vit á tann bógvin, at vit hyggja at smærri feltum, sum passa til portefølјuna hjá felagnum. Eisini hyggja vit at øðrum feløgum, sum kanska ynskja at gerast partur av Atlantic samtakinum, sigur Wilhelm Petersen.

Hann heldur serliga, at tað er ein fyrimunur, at Atlantic Petroleum er skrásett á einum norðurlendskum høvuðsmarknaði, og at felagið liggur rættiliga í einari serstøðu á danska marknaðinum við tað at felagið er skrásett á olju- og gassmarknaðinum.

- Og tað hevur vakt ans hjá fleiri øðrum feløgum, sigur Wilhelm Petersen.

Sum er framleiðir Atlantic Petroleum úr tveimum brunnum, men útlitini eru góð at farið verður undir aðrar framleiðslur innan rímiliga tíð.

- Í løtuni framleiða vit úr brunnum á tveimum økjum, og sum útlitini eru í løtuni eru vánir fyri, at vit fara ar framleiða úr tveimum nýggjum feltum innan fyri tvey til trý ár, sigur Wilhelm Petersen.

Hann sigur, at við hesari kapitalhækkingini og tí peningastreymi, sum felagið hevur í dag frá framleiðsluni, hevur felagið likviditet at gera onnur ting.

- Vit hava til dømis møguleika at gera, sum vit gjørdu fyri nøkrum árum síðani, og uppkeypa feltir til útbyggingar, sigur Wilhelm Petersen, stjóri í Atlantic Petroleum.

# Fyrilestrar um tosk

**Í samband við at Petur Steingrund júst hevur vart doktararitgerð um hetta evnið, skipar Havstovan saman við Magn fyri fyrilestrum kring landið**

TÍÐINDASKRIV



*Petur Steingrund, sum júst hevur vart doktararitgerð, fer at halda fyrilestrar kring landið*

Í døgunum 16. til 19. november verða áhugaverdir fyrilestrar við Petur Steingrund um evnið »Hvat hendi við toskinum í nítiárunum«.

Ritgerðin kom fram til fleiri slóðbrótandi niðurstøður, millum annað, at tað ikki passar fyri føroyskan tosk at "fiskur hevur stert". Heldur ikki passar tað, at ein stórur gýtingarstovnur gevur stóra tilgongd, nakað, sum annars er ein hornasteinur í siðbundnari fiskifrøði.

Ístaðin varð gomul føroysk vitan brúkt fyri at koma fram til høvuðsúrslitið í ritgerðini: At raktoskur (slánar) nær landi darva yvirlivingini hjá 1 ára gomlum smáfiski, meðan nógvur toskur útiá gevur góða yvirliving av 2 ára gomlum smáfiski.

Ritgerðin gevur eisini svar uppá, hvussu stórur toskastovnurin/veiðitrýstið skal vera, fyri at fáa størst møguligu veiðu og virði til tað føroyska samfelagið.

Í fyrilestrunum verður eisini greitt frá um gróður undir Føroyum. Tað er orkufelagið Magn, sum saman við Havstovuni samskipar hesar fyrilestrar.

Mánadagin 16. november verður fyrilesturin á Seglloftinum á Tvøroyri, týsdagin 17. november í skúlanum á Giljanesi. Mikudagin 18. november í Løkshøll í Runavík og hósdagin 19. í Atlantis í Klaksvík. Allir fyrilestrarnir byrja kl. 19.00 og eru øll vælkomin.

